# Eg gekk mær eftir bønum fram

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Ein stuttligur rørslusangur, har øll kunna vera við, og sum kann nýtast bæði innan- og uttandura.**

Øll sum eru við leiðast og ganga runt í ring, meðan sungið verður. Meðan sungið verður "eg búgvi í Klappivík, Krúpivík, Lakkivík, Dansivík...o.s.fr." gera øll samstundis tað, sungið verður um. Øll, børn og vaksin, kunna verða við til, at finna uppá nýggj hugtøk - bert hugflogið setur markið.

*Lag: Jeg gik mig over sø og land*

*"Eg gekk mær eftir bønum fram,*
*har hitti eg ein gamlan mann.*
*Hann smíltist, tá hann sá meg og,*
*hann spurdi, hvar eg búði."*

*"Eg búgvi í Klappivík, Klappivík, Klappivík,*
*og øll tey børn, sum búgva har,*
*tey duga væl at klappa."*



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo